Runavíkar Kommuna

## Tannlækni til Tannlæknastovuna á Skála

Søkt verður eftir tannlækna til Tannlæknastovuna á Skála, at byrja 1. september 2008 ella eftir nærri avtalu.

Á Tannlæknastovuni verða árliga viðgjørd uml. 500 børn og ung millum 0 og 16 ár.

Lagdur verður stórur dentur á dygd, góða tænastu og góð samstarvsevni.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Tannlæknafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Øll viðgerð fer fram á væl útgjørdu Tannlæknastovuni á Skála, har ein tannrøktari og ein klinikkassistentur eru í parttíðarstarvi.

Møguleiki er eisini fyri at gera leiguavtalu millum tannlæknan og kommununa, soleiðis at tannlæknin kann reka privata praksis á Tannlæknastovuni ein part av degnum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til borgarstjóran, á tlf. 22 65 19 ella kommunuskrivaran á tlf. 28 17 90.

Umsóknir við viðkomandi upplýsingum skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 15. august 2008.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139 · FO-610 Saltangará

# Rudding

Sørvágs kommuna fer nú at rudda allar almennar vegir og øki í kommununi.

Bilar, bátar, amboð og annað, sum ikki hevur frámerki, ið sigur, hvør eigarin er, verður beint burtur.

Øll, sum hava slíkt órudd standandi á almennum øki, verða biðin um at beina tað burtur í seinasta lagi 22. august 2008. Órudd, sum ikki er burturbeint innan henda dag, fer kommunan at beina burtur. Kommunan tilskilar sær rætt at krevja úrteiðslunar av burturbeiningini endurgoldnar frá eigaranum. Samstundis heitir kommuna vinarliga á øll, sum hava bilvrak ella annað órudd standandi á egnum øki, um at beina hetta burtur. Kommunan vil fegin leiðbeina nærri um hetta.

**Sørvágs Kommuna**
www.sorvag.fo
VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 363200 / 363206

EIÐIS SKÚLI · ÁBYRGD · TRIVNAÐUR · LÆRA

# EIÐIS SKÚLI

Kolsvegur 8 · Postrúm 29 · FO-470 Eiði
Heimasíða: www.eidisskuli.fo

## Søkt verður eftir lærara til Eiðis skúla

- 1 tíðaravmarkað starv fyri lærara í farloyvi skúlaárið 2008/2009.

**Tann, ið settur verður skal:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær at undirvísa í hesum lærugreinum :

Føroyskt 3./4. fl., Enskt 7. fl., Føroyskt 7. fl. Serundirvísing. Tann, ið settur verður, skal røkja flokslærarauppgávuna í 7. flokki. Harumframt er ynskiligt, at viðkomandi kann taka sær av bókasavninum. Talan er uml. 23 undirvísingartímar og 3 bókasavnstímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett 1. september.

**Førleikakrøv:**
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður hevur læraraútbúgving. Tó eru onnur vælkomin at søkja.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira kann fáast at vita um starvið frá fyrstalæraranum Tom Joensen á tel. 22 90 45.

Umsóknir, saman við c.v. og prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 31.juli 2008 kl. 12.00.

Eiðis Skúli
Postrúm 29
470 Eiði

**Eiðis skúli** hevur undirvísing í 1. – 7. árgangi. Skúlin er væl útgjørdur við serstovum, lærarahølum og ítróttahøll. Hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Í skúlanum starvast 9 lærarar og 2 stuðulsfólk. 80 næmingar eru í Eiðis skúla. Les meira um okkum á www.eidisskuli.fo

## Lærarastarv/vikarstarv í Fuglafjarðar skúla

Starv lýst leyst til setanar:

- 1 lærari í tíðaravmarkað starv frá 1. sept. og alt skúlaárið 2008/2009 fyri lærara, ið fer frá við eftirløn.

**Søkt verður eftir lærara/vikari, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- er stundisligur og nærlagdur

**Tímatalva:**
2. fl.: 2t. kr., 7t. støddfr., 1t. heimst., 1t. evning
3. fl.: 8t. fø., 2t. heimst., 1t. tón., 1t. evning
5. fl.: 2t. evning

**Førleikakrøv:**
Tann, ið verða settur í starvið, skal helst hava læraraútbúgving, men onnur við aðrari útbúgving kunnu eisini søkja starvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastarvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Lærarastarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum/skúlanum í hendi **í seinasta lagi hósdagin 7. august kl. 10**

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 737761. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

Fuglafjarðar skúli hevur komandi skúlaár umleið 290 næmingar í 16 flokkum, og her koma at starvast 34 fólk.

Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

**Fuglafjarðar skúli**
**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður**

# Kassafólk

Søkt verður eftir fólki at passa kassan og fylla vørur upp á hillar at byrja í august.

*Keypmaðurin "úti í Grønlandi"*
*JOHANNES ANDREASEN*
Pf. Johannes Andreasen · Grønlandsvegur 16
Tel. 31 20 87 · ja@post.olivant.fo

# STONGT

Vit hava stongt í viku 31

Opið verður aftur, sum vanligt mánadagin, 4. august

Følnix
Á Hjalla 20 Tlf. 31 16 31